# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

3. mars fingu Oddbjørg A. og Rúni Sigurðsson, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

4. mars fingu Leila Thomsen og Jógvan á Høvdanum (yngri), Nes Hvalba, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4660 gr.

5. mars fingu Diana Müller og Hans Pauli Dahl, Vági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

8. mars fingu Lis og Bogi M. Hansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

11. mars fingu Guðrið Danielsen, Válu, og Ove Magnussen, Glyvrum, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3270 gr.

13. mars fingu Christina Holm, Vági, og Jakob Skaaning, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

14. mars fingu Elin Hansen og Torkil Akraberg Hansen, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2900 gr.

14. mars fingu Heidi og Tummas Petur Davidsen, Runavík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3775 gr.

15. mars fingu Eyðna Oknadal og Henrik Lunde, Herning, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2500 gr. Stóribeiggin eitur Sebastian Heðin Oknadal.

15. mars fingu Judith Eysturtún Rubeksen og Jógvan Rubeksen, Hoyvík, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4400 gr.

15. mars fingu Rannvá K. Mourtisen og Frank H. Herlufsen, Argjum, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3710 gr.

16. mars fingu Mariann N. Joensen og Birgir Joensen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4500 gr.

16. mars fingu Beinta Hansen og Thomas Joensen, Kollafirði, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 4650 gr.

17. mars fingu Davia Nicolajsen og Hans Jacob R. Petersen, Syðrugøtu, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3800 gr.

18. mars fingu Jonna Sjúrðaberg og Kim Petersen, Leir´vik, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2910 gr.

## Minningarorð um Randi Heinesen

**Fødd 23. september 1947 Andaðist 7. februar 2004**



Grækarismessan er og várið hoyrist kalla, fuglar vitja landið og blómurnar spíra. Men tú, góða Randi, ert farin hiðani fyri stuttari tíð síðan, og tí tykist gleðin um várið ikki tann sama.

Fyri einum ári síðani komst tú á Ellisheimi, har tú starvaðist sum kokkur, og greiddi okkum starvsfeløgum frá, at tú hevði fingið herviliga sjúku at dragast við. Opin og erlig sum tú altíð var, greiddi tú frá tínari støðu og endaði við at siga, at tú hevði havt eitt gott og ríkt lív saman við Hans Esbern og familju tíni. Tit fingu trý børn, sum tit vóru sera glað fyri, síðan trý verbørn og ikki minst tey fimm ommubørnini, sum tú gleddist um og sum var ein stórur partur av lívi tínum.

Tú var kokkur her á Ellisheiminum í út við 20 ár og setti tú við tínum lívsdirvi eins og tínum positiva og lætta lyndi dám á húsið. Tú var altíð greið í tínum meiningum og legði ikki fingrarnar ímillum, um so tosið snúði seg um politikk ella onnur av lívsins viðurskiftum. Tað gjørdi, at tú skapti tryggleika rundan um teg, tí man visti altíð hvar man hevði teg.

Tú var altíð fús at stíla fyri, um so hugnakvøld, veitslur, útferðir ella onnur tiltøk fyri búfólk, avvarðandi og starvsfólk, vóru á skránni. Har tú var, var altíð stuttligt og hugnaligt at vera, tí tín partur lá ongantíð eftir.

Frammarlaga í huga tínum var sangurin, og sjálv festi tú mangan sangin á blað. Tú dugdi heilt nógvar sangir, bæði fosturlands-, veitslu- og andaligar sangir. Mangar ógloymandi løtur hava vit havt saman við tær og við Hans Esbern, bæði í gaman og álvara.

Líka til tað seinasta hevði tú eina innaru styrki og vón, sum var rótfest í sannføringini um, at tú, tá tíðin var runnin, komst heim til Harran og skuldi møta tínum kæru og okkum øllum aftur.

Nú Randi er farin, er ein stórur sessur tómur.

Vit á Ellisheiminum hava kensluna av einum svárum missi, tó at vit vita, at svárast er missurin hjá tær Hans Esbern og børnum tykkara við familju. Tit skulu vita, at okkara tankar ofta leita til tykkara. Má Harrin styrkja tykkum í sorg og sakni tykkara.

Ærað veri minnið um Randi.

**Starvsfólkið á Ellis- og Umlættingarheiminum**

ENJO Føroyar:

## Prógv sum ENJO-ráðgevarar




*Skeiðluttakarar við prógvum: f.v. Tone Sagedal, skeiðleiðari, Kærnø Neshamar, Ann Zachariasen, Sofus Gaasedal, Tórharda Bláhamar, Anna Jørmundson, Jórun Johannesen, Marin Bláhamar, Ninni Enni og Sonja Fuglø. Sitandi f.v. Anna Petra Winther og Karlon Winther.*

Í døgunum 6. og 7. mars 2004 skipaði ENJO Føroyar fyri vaskiskeiði á Hotel Føroyum fyri ENJO-ráðgevarar. Skeiðleiðari var Tone Sagedal úr Norra, sum hevur 11 ára starvsroyndir sum ENJO-ráðgevi.

Skeiðluttakararnir fingu prógv, sum ger tey før fyri at læra føryingar at gera reint einans við ENJO og og køldum vatni.

Umframt luttakararnar á myndini eru nøkur fleiri fólk knýtt at ENJO Føroyum

## Angela og Hannibal til Sands

UNDIRHALD
*Tíðindaskriv*

Í dag, leygardagin, hava børnini á sandoynni nakað at gleða seg til, tí nú fáa tey nevniliga vitjan av Angelu og Hannibal.

Mangan hevur verið ynskiligt at fingið tey bæði Angelu og klovnurin Hannibal suður til Sands at upptraðka, men tað hevur tíverri ikki ligið so væl fyri. Men nú umsíður bar tað endiliga til.



Tiltakið verður í Virkinum á Sandi, og tað byrjar kl 16:00.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Jens Jensen, Lessebo í Svøríki:

## Hálvur føroyingur búð í Svøríki í meira enn 50 ár

**Í sambandi við at bilasølan VR Bilar í Havn herfyri gjørdi avtalu við svensku JOAB verksmiðjuna um at umboða teirra skiftilastskipanir og aðra útgerð, var ein av sølumonnunum, Jens Jensen, og vitjaði í Føroyum. Jens er hálvur føroyingur**



*Jens Jensen arbeiðir í dag sum sølumaður hjá svensku JOAB verksmiðjuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mikukvøldið 25. februar skipaðu VR Bilar í Havn fyri einum lastbilakvøldi á bátasavninum í Leirvík í sambandi við at teir høvdu gjørt avtalu við svensku JOAB verksmiðjuna.

Ein av luttakarunum hetta kvøldið var Jens Jensen, sølumaður hjá JOAB. Jens tosar danskt/svenskt - hann hevur búð í Svøríki síðan 1952.

Tað er ikki av tilvild, at Jens nú bjóðar føroyingum sínar vørur, størsta orsøkin er nokk tann, at hann hevur røtur í Føroyum og skilir føroyskt. Hann er føddur á Argjum í 1943 og búði eitt skifti sum smádrongur í Rituvík, har móðurin eisini er ættað.

Móðurin Anna, f. Højgaard, sum nú er 83 ára gomul, er ommudóttir Hans Paula Højgaard, sum var tann 8. niðurseturmaðurin, ið setti búgv í Rituvík, og tann fimti og yngsti sonur toftabóndan, sum lat synum sínum jørð at dyrka í Rituvík.

Mamma Onnu doyði á barsilsong, tá Anna var 9 ára gomul, og faðirin gekk burtur við sluppini "Verdandi" undir Islandi í 1944, har eisini bróðurin, hin bert 22 ára gamli Hans eisini fórst.

### Foreldrini møttust á Sjómansheiminum

Tá Anna var vaksin, fór hon til Havnar at tæna á Sjómansheiminum. Og tað var har hon møtti Poul, sum hon seinni giftist við. Hetta var í 1941 - undir krígnum. Poul var á Sjómansheiminum tí skipið, "Diana", sum hann var við, varð søkt av týskinum sunnan fyri Føroyar. Hetta var eitt danskt farmaskip, sum í konvoy var á veg vestur um hav, tá teir vóru álopnir av einum týskum kavbáti. Skipið var so meint rakt, at tað sakk, men manningin var tó so heppin, at koma sær á ein flaka, og vinna upp land í Føroyum. Nú vóru teir so strandaðir á Sjómansheiminum og sluppu ongan veg, so leingi kríggið leikaði á.

Anna og Poul giftust 20. mars 1943, og árið eftir fór Poul avstað aftur við einum øðrum skipi. Hetta bleiv sera vandamikil sigling, tí tá onglendingar og amerikanarar gjørdu endaligu innrásina í Normandínum, sigldi Poul í pendulfart, sama túrin sum hermenninir, við vápnum og lóðri.

Í 1943 fekk Anna fyrsta barni, ein drong sum fekk navnið Jens. Hetta var ein sera stravin tíð hjá Onnu, tí einki var at frætta frá manninum, sum hon visti var mitt í endastríðnum av seinna heimsbardaga.

Men umsíðir kom Poul aftur til Føroyar, og tey avgjørdu at fara til Danmarkar at búgva, men har var einki arbeiði at fáa, so Poul fór aftur út at sigla eitt stutt skifti. Í meðan búði Anna hjá vermammuni onkustaðni úti á landinum.

### Fluttu til Svøríkis

Árið eftir fluttu Anna og Poul við børnunum til Svøríki at búgva. Poul hevði fingið arbeiði á eini pappírsverksmiðju í Smålandi í einum lítlum býi, sum eitur Lessebo. Tey fyrstu árini í hesum nýggja landi vóru sera stravin hjá Poul, langir arbeiðsdagar í vánaligum arbeiðsumhvørvi við nógvum lukti og ótolandi hita. So skjótt børnini vóru so fræg, at tey byrjaðu í skúlanum, fór Anna eisini at arbeiða á verksmiðjuni, men var hetta eitt lagaligari og meira hóskiligt arbeið fyri kvinnur, og í langa tíð arbeiddi hon við at telja og pakka pappír.

Anna hevur onkuntíð greitt frá, hvussu fátæka hon kendi seg, tann dagin tey komu til Lessebo. Tey vóru kona og maður við trimum børnum, Jens, Sonju og Hans, og alt tey áttu var í einum kufferti. Tey fluttu inn í eina smáttu, sum hoyrdi til verksmiðjuna. Hetta var ein lítil reyður træskúrur við hvítum vindeygum, eins og vanligt var tá. Húsið stóð niðri við ánna, eitt av nógvum, sum sokallaðir fremmandaarbeiðarar búðu í. Jens, minnist hesa tíðina sum ógvuliga buldrasliga, við nógvum ófriði, larmi og slagsmálum. Nógv fólkasløg arbeiddu á verksmiðjuni, og búðu sostatt í grannalagnum, og ringt var at fáa hesar ymsu mentanirnar at sampakka í friði og náðum.

Jens byrjaði sum ungur at arbeiða hjá Lessebo Hydraulik, sum í størsta mun hevur specialiserað seg í at útbyggja og montera øll møgulig arbeiðstól til lastbilar, mest kranar, stigar og lastir av ymsum sløgum. Í 1970-unum fingu teir patent upp á Lessebo-lyftina, sum er ein krani til at lyfta t.d. vanligar bingur, skrellibingjur o.a. upp á bilar, uttan at førarin nýtist at fara úr bilinum.

Tað gingu heili 16 ár til Anna og Poul aftur fingu høvið til at vitja í Føroyum, men síðani hevur øll familjan regluliga vitjað, tó ikki so nógv tey allar seinastu árini.

Jens er giftur við Inger, og eiga tey 3 børn, Ann, Karina og Mathias og 4 ommu- og abbabørn.

### Vitjar familjuna í Føroyum

Fyri nøkrum árum síðan bleiv Lessebo Hydraulik uppkeypt av JOAB, sum frammanundan var ein stórur uppbyggjari av lastbilim í Svøríki. Við samanleggingini er JOAB enn sterkari, og stendur fyri 60 prosentum av marknaðinum í Svøríki, og útflyta eisini sínar vørur og tænastur til m.a. Eysturríki, Týskland, Niðurlond og nú eisini til Føroyar. Tey seinastu mongu árini hevur Jens starvast sum sølumaður.

Nú Jens var í Føroyum, vitjaði hann sjálvandi familjuna. Í Rituvík fekk hann eitt eintak av blaðnum "Keraldi" sum felagið Forni á Glyvrum gevur út. Í hesum blaði var áhugaverd grein um ættina í Rituvík, og á forsíðuni var mynd av Jens, har hann sum tvey ára gamal er avmyndaður saman við langommuni og einum systkinabarni í Rituvík umleið 1945.

Hetta er fyrstu ferð at Jens sum vaksin er her á vetri, og sigast skal, at tað var vetur bæði við kava, kulda og nógvum vindi. Honum dámdi væl hesa vikuna, hann vitjaði. Hann var glaður fyri turra tjóðgvið, hann fekk frá mostrini í Fuglafirði, og kemur hann óiva skjótt aftur til Føroya. Men honum dámdi illa at koyra bil um føroysku fjøllini í vindi og jarðroki, tí sum hann segði: ..."Jag kommer snart tilbaka - men aldrig atter på vinteren".

## Brúdleyp

Í dag, 20. mars kl. 15.00 giftast í Betesda Valborg Hallursdóttir Laksáfoss og Anfinn Eivindarson Jacobsen.

Vælkomst verður á Hotel Norð kl. 21.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 20. mars kl. 17.00 giftast á Sýsluskrivstovuni á Tvøroyri Aroseak Barbarian, Armenien og Rúni Hammer, Hvalba.

Brúdleypsadr.: Hotel Øravík.

## Prógv

8. mars hevur Fróði Sivertsen Funningur, lokið prógv sum cand.merc.aud. við Syddansk Universitet í Kolding.

## Andlát

11. mars
Margretha Eidesgaard, Eiði, 78 ár.
Jacob Johannes Joensen úr Hvannasundi, 73 ár.
Jóannes Olsen, keypmaður Hósvík, 63 ár.
Pól Joensen, Pól í Búðini á Sandi, 83 ár.

12. mars
Edvin Strøm, Vágur, 76 ár.
Jóhan Magnussen, ættaður úr Sandavági, búsitandi í Hirtshals, 62 ár.

13. mars
Jensina Hansen, Sørvágur, 37 ár.

14. mars
Hallur Laksafoss, Klaksvík, 77 ár.

15. mars
Jóhanna Andrea Durhuus, Vestmanna, 90 ár.
Thorstein Jørgensen, ættaður úr Sørvági, búsitandi í Tórshavn, 78 ár.

16. mars
Erling Christiansen, í Víkinum í Klaksvík, 81 ár.
Esther Funding, fødd Jensen, 71 ár.

17. mars
Gerda Jensen, fødd Eliasen, búsitandi í Holbæk, 74 ár.
Jákup Vang Andreasen, koyrilærari, 59 ár.
Róbert Tómasson, ættaður av Skipanesi, búsitandi í Keflavík í Íslandi.
Torvald Hammer Haraldsen, ættaður úr Sørvági, búsitandi í Tórshavn, 72 ár.

## Tøkk

*Hjartaliga tøkk til tykkum, sum við fjarritum, telefonsamrøðum, blómum, gávum og vitjanum gleddu meg á 90 ára føðingardegnum tann 16.2.04.*

*Blíðar heilsanir*

**Hans Peter Djurhuus**